## Viðmerking:

*Ríkisrættarsamráðingar:*

# Latið provokatørin sita eftir

*Ásannandi at danskt fíggjað loysing ikki er væntandi, er mest rabiati parturin av samgonguni í staðin farin eftir totalari konfrontasjón. Skal nakað henda, er neyðugt, at hesin partur verður skerdur. Tíverri sýnist ikki so at vera.*



Fyri nøkrum døgum síðani fréttist (úr Danmark, sjálvandi), at føroyingar høvdu gjørt eina fullkomiliga útskifting í samráðingarstøðinum fyri fundinum við donsku stjórnina 2. mai. Hetta kundi boðað frá góðum, tí dag undan degi er tað blivið alt meira greitt, at føroyska samráðingarnevndin á fyrsta fundinum bert gjørdi sjálvmál — og tað í hópatali.

**Óprofessionellir provokatørar**

Sum danskir fjølmiðlar og FF-blaðið í Føroyum hava víst á, er tann mynd, sum landsstýrið og tess fjølmiðlar hava borið føroyingum um samráðingargongdina á fyrsta fundinum ógvuliga langt frá veruleikanum. Samgongan roynir at fortelja okkum, at danir vóru ólátaðir og tóku føroyingar á bóli við eini stivrendari støðu, samstundis sum teir lótu almenninginum upplýsingar, sum teir høvdu fingið í trúnaði. Men nú vísir tað seg, at landsstýrið kravdi allar samráðingar myrkalagdar, legði fyri stjórnina lyklatøl, ið vóru burturúr vón og viti og skuldsetti danskar ráðharrar at vera ósiviliseraðar. Harafturat hevði landsstýrið, bert fáar dagar undan samráðingarfundinum eitt fjølmiðlashow — sum vanligt uttan ein einasta kritiskan spurning — har danir fingu eina rokning á millum 30 og 90 milliardir fyri NATO støðirnar í Føroyum. Henda taljongleran í sjálvum sær var nóg mikið til longu frammanundan at forpesta samráðingarandan. Og tá so landsstýrið harafturat á sjálvum samráðingarfundinum royndi at gíðslataka donsku stjórnina, er ikki so løgið at landsstýrið fekk eitt mótspæl, sum eftir stuttari løtu gjørdi, at landsstýrið mátti biðja um time-out.

**Time-out og out og out**

Eftir fundin royndi landsstýrið at lata seg í martýrbúna. Væl stuðlaðir av føroysku miðlunum gjørdu tey eitt stórt nummar burturúr, at forsætismálaráðharrin fór á tíðindafund einsamallur. Hetta var óreint, søgdu tey. Men eisini hetta, vísir tað seg nu, var ein reingjan av tí, sum veruliga fór fram. Tað er nevnliga komið fram, at danir fleiri ferðir sendu boð til føroysku samráðingarnevndina —sum nú hevði hildið time-out í fleiri tímar — at nu mátti avtalaði tíðindafundurin haldast. Tíðindafólkini høvdu tá bíða í tímar og dead-line nærkaðist. Tó — landsstýrið var ikki sinnað at enda sítt time-out. Og tískil fór forsætisráðharrin einsamallur á tíðindafund. Á tíðindafundinum greiddi hann so frá, hvat stjórnin hevði sagt á samráðingarfundinum. Men sambært firtnu landsstýrisfólkunum var tað ólátað av forsætismálaráðharranum at greiða tíðindafólkunum frá, hvat danska stjórnin hevði sagt. Í heila tikið sýnist tað sum um landsstýrið heldur, at danskir politiskir myndugleikar ikki hava rætt til at hava eina meining í málinum. Hetta hóast landsstýrið ætlar at binda danskar myndugleikar fíggjarliga og umsitingarliga í mong ár framyvir. Danir skulu ikki ditta sær at hava nakra meining um, hvussu teirra framtíðar leiklutur skal verða.

**Konfrontasjónskós til heimabrúks**

Tá landsstýrið langt um longi mátti ásanna, at óprofessionella diktatkósin ikki eydnaðist, bleiv øll orka løgd í at hjúkla um heimabeitið. Samfeldu miðlarnir í Føroyum — við FF-blaðnum sum glógvandi undantakinum — blivu spentir fyri martýr- og konfrontasjónsvognin. Endamálið var týðuliga eftir Dalgaska setninginum "Hvad udad tabes, skal indad vindes". Einastu ráð vóru at píska upp eina kenslu í Føroyum av at vera órættvíst viðfarin. Soleiðis skuldi áhugin í Føroyum fáast burtur frá jánkasliga útpælinum hjá landsstýrinum. Og spoleiðis skuldi sjóneykan vendast burtur frá tí veruleika, at ætlan samgongunnar ikki hongur saman — hvørki búskaparliga ella ríkisrættarliga — og vil merkja minni sjálvstýri og eitt karrátt láglønarsamfelag við minkandi fólkatali.

Men tað fer ikki at bera samgonguni til áhaldandi at snúgva sær uttanum sjálvgjørdu trupulleikarnar. Er nakar í samgonguni veruliga áhugaður fyri eini veruligari, varandi og virðiligari loysn í ríkisrættarspurninginum, er tað í tøkum tíma at tey taka annað skinn um bak. Annars er stórur vandi fyri, at alt dettur á gólvið og endin verður eitt framhaldandi eljustríð, sum fer at forða fyri viðgerð av øllum øðrum spurningum í mong ár framyvir.

**"Virtual reality"**

So tá tað herfyri kom fyri ein dag, at landsstýrið ætlaði at saðla um, vóru kanska nøkur, sum hildu, at nú hevði løgmaður gjørt bart — hevði stongt fyri órealistisku konfrontasjónsleiðini, ja, kanska enntá hevði ásannað at skal nakað røkkast er neyðugt at skerja provokatørin og kanska lata hann sita heima eftir.

Men so var ikki. Í staðin boðar landsstýrið frá, at nú hevur man funnið eitt nýtt katalog, har innihaldið er hitt sama, men litirnir eitt sindur annarleiðis.

Og harafturat leggur løgmaður nýggj konfliktøki fram — og enn einaferð heimagjørd. Enn einaferð roynir landsstyrið at leggja fyri stjórnina ultimatum, sum í roynd og veru er politisk gíðslatøka. Nú skal danska stjórnin binda seg í forhond til programm landsstýrisins.

Á heimafrontinum leggur løgmaður hetta út sum at danir, um teir ikki ganga undir kravboð landsstýrisins, kvetta alt samband og alt samstarv við Føroyar. Og hetta hóast allir danskir politikarar — úr øllum ættum og á øllum stigum — greitt hava sagt, at líkamikið hvør útgangurin verður, so verður framhaldandi samstarv og samband millum Føroyar og Danmark. Men teir tilskila sær sjálvsagt rætt til at verða við til at avgera, hvussu hetta samstarv skal vera. Og teir tilskila sær rætt til sjálvir at avgera, hvussu nógv og hvussu longi teir vilja gjalda og hvussu teirra umsiting skal brúkast í hesum samstarvi.

Niðurstøðan er tíverri, at beint undan øðrum samráðingarfundi finnur løgmaður nýggj konfliktøki, leggur hann fótonglar fyri samráðingunum. Og tað pínliga er, at hesar andsagnir eru sjálvuppfunnar. Ja, landsstýrið sýnist at liva í tí, sum á nútíðarmáli verður rópt "virtual reality".

Og tá eru útlitini vánalig.

**Bergur P. Dam**





**Nú** kann **PIZZA 67** sum nakað heilt nýtt bjóða øllum tykkum, ið eta á matstovu okkara ókeypis **breyðstengur** aftur við ella áðrenn matin, tá tit keypa pizza ella burgara. Hetta er sjálvandi eisini galdandi fyri øll tykkum, ið bíleggja mat og sjálvi avheinta hann...

***So minst til***: Næstu fer tú bíleggur pizza frá okkum og vit geva tær hesar **vælsmakkandi breyðstengurnar** afturvið, so er tað ikki tí, at vit hava tikið ímóti skeivum ordra - breyðstengurnur fylgja við, um tú etur tær ella ikki...

Tilboðið er galdandi til 1. juni 2000

Opið er:
Mán.-frí.: 12-14 og 17-24
Ley. og sun.: 14-24

til øll teirra, sum eta hjá okkum og teirra, ið sjálvi avheinta mat frá okkum...

PIZZA 67

Tinghúsvegur 8 • Tórshavn

TEL 35 67 67

petur & petur • 320870


# Sjálvstýri, loysing

Stutt fyri jól stóð eitt svar ella ein viðmerking til endurgáva í Oyggjatíðindum fyrst í desember av fyrstu av 6 smávegis styttum smávegis broyttum greinum, sum fyrr hava staðið í Dagblaðnum frá februar/mars 1995 og framhaldandi, 28 íalt, í Oyggjatíðindum til fyri treimum árum síðani.

Trúgvi F. Guttesen sigur, at eg eri ørkymlaður um ríkisfelagsskapsmálið sum hann væl skilir, leggur hann aftrat, og at eg vil hava sambandskar, dansk sinnaðar føroyingar at fylta niður aftaná eitt fullveldi. Hetta seinasta ivist eg í er vent til mín persónliga. Eg helt, at ongin grund var til at ivast í, at eg eri á loysingarsíðu. Eg haldi meg ikki hava sagt nakrastaðni í greinunum, at sambandskir føroyingar skulu flyta niður aftaná fullveldi, heldur ikki lagt upp til tað. Her skal eg leggja aftrat, at sjálvandi hava føroyingar, sum hava føroyskan bústaðarrætt, somu rættindi.

Trúgvi F. Guttesen nevnir so eitt uppskot um samríki við Danmark í sama viðfangi, sum tosið um ørkymlanina um ríkisrættarligu viðurskiftini, so hann kemur næstan at siga, at eg skuldi kunnað tikið undir við tí. Tað geri eg ikki. Í uppskotinum, Sambandsflokkurin arbeiðir við nú, um Samríki, er onki nýtt hent frá støðuni frammanundan eins og í ríkisfelagsskapsuppskotinum hjá J. Eidesgaard fyri Javnaðarflokkin undir navninum Sjálvstýri. Hvørki brýtur við ríkisfelagsskapin, sum hann higartil er kendur. Hetta er eisini trupult, tí gera tey tað, skal sambandsflokkurin næstan til at niðurleggja seg sjálvan. Javnaðarflokkurin skal til at taka frástøðu frá fyrru søgu síni, tí undir krígnum, serliga í 1946.

Eisini sigur Trúgvi F. Guttesen, skilt við hetta, at eg skal hava skrivað í greinunum, at summir føroyingar síggja niður á aðrar orsakað av politiskari støðutakan á hvør sínari síðu í loysingarmálinum. Tað ljóðar sum um tað er sagt í tí smáa í dagligdegnum, sum eg ikki minnist meg hava sagt og kann láturliggera trupulleikan. Eg nevni hetta í samband við starvseting í tí almenna og alment líknandi størvum, hjar so nógv er goldið úr Danmark, so støðan til tað landið illa er uttanumkomandi at hava týdning. Tað er ikki so nógv at síggja niður á sum at vit ikki eru javnbjóðissettir har. Skúlin er í flestu førum í Keypmannahavn ella Áarósa og øðrum býum niðri. Samskiftið har endar fyrr ella seinni hjá dønum, tá lagað skal verða fyri starvi.

Hetta er viðmerking til mesta ella alt av tí, ið stóð í stutta stubbanum í Dimmalætting stutt inn í desember síðsta ár, endurtikið á síðu 2 í Sosialinum fáar dagar seinni.

**Mannbjørn J. Jacobsen**

# Eingi krøv sett til jarðarfyrisitingina

*Jarðarfyrisitingin hevur líka til 1995 verið politiskt sett, tað vil siga at krøvini til Jarðarráðið einamest hava snúð seg um at hava eina breiða politiska umboðan í ráðnum, og ikki at hava professionella fyrisiting av landsjørðini, sigur landbúnaðarmálaráðharrin Finnbogi Arge*



Ólavur í Beiti

– Tørvur tykist vera á at útbyggja amboðini í verandi lóggávu, tað vil siga at fáa til vega greiðar reglur og mannagongdir fyri fremjing av lógarinnar ásetingum. Hetta tí at nógv bendir á, at soleiðis sum lógin higartil hevur verið umsitin, hevur ov lítil dentur verið lagdur á at brúka tey amboð, sum eru tøk í galdandi lóggávu – her verður serliga hugsað um, at tað ikki hevur fingið avleiðingar, tá t.d. jørðin er fallin í órøkt.

– Vantandi handhevjanin av lógarinnar ásetingum kann partvíst tilskrivast, at eingin politikkur hevur verið fyri landbúnaðin, og eisini at eingi krøv hava verið sett til jarðarfyrisitingina. Jarðarfyrisitingin hevur líka til 1995 verið politiskt sett, tað vil siga at krøvini til Jarðarráðið einamest hava snúð seg um at hava eina breiða politiska umboðan í ráðnum, og ikki at hava professionella fyrisiting av landsjørðini.

– Staðfest er, at ov lítil dentur hevur verið lagdur á at menna landbúnaðin. Skuldarbyrðan hjá festibóndum er eitt tekin um, at endamálið við landsjørðini ikki er rokkið. Ov stórar íløgur eru gjørdar í fjós, neyt v. m, sigur Finnbogi Arge í nýggja tilmælinum, tá ið hann umrøður karmar.

**Skuldin 98 mió. kr**

Og upplýst verður, at skuldin til Jarðargrunnin var pr. 31. des. 1999 156 mió. kr., harav fallin gjøld pr. 1. des. 1999 vóru 20 mió. kr. Av teirri samlaðu skuldini til Jarðargrunnin eru 38 mió. kr. ella 24% lán hjá ognarmonnum ella privatum fyritøkum (MBM o.ø.), restin er lán til festarar og felagshagar, sum eisini kunnu vera ognarhagar. Samlaða skuldin hjá festibóndum til Jarðargrunnin er d.d. góðar 98 mió. kr. Nógv størsta útlánið er til fjós, har restskuldin pr. 31. des. 1999 var 86 mió. kr. Restskuldin av seyðahúslánum var 4.8 mió. kr. og av maskinlánum 4.7 mió. kr.

– Samanbera vit landbúnaðin og alivinnuna, er stórur munur á framleiðsluvirðinum og virðisøkingini hjá hesum vinnum. Men í nærum øllum øðrum viðurskiftum hava hesar vinnur felags eyðkenni. Grundarlagið hjá hesum vinnum er jørðin og firðirnir, sum er at meta sum »ogn« hjá tí almenna.

– Landbúnaðarvinnan hevur í dag nakrar av teimum somu trupulleikunum at dragast við, sum alivinnan hevði miðskeiðis í 80-unum, tá kapitalgrundarlagið hjá vinnuni var ov veikt, og talið av virkjum - vegna húsagang - minkaði munandi.

**Festini smá og kapitalveik**

– Einstøku festini eru í fleiri førum smá og kapitalveik. Ov lítið er gjørt burtur úr at gagnnýta royndir úr øðrum londum, og lítið og einki granskingarvirksemi er farið fram í landbúnaðarvinnuni. Støða verður ikki her tikin til, um 399 festir er ov nógv ella ikki; men tað er ein sannroynd, at fleiri festarar hava ikki megnað at hildið skyldur sínar, hvørki tá talan er um gagnnýtslu, røkt av jørðini ella skyldurnar mótvegis Jarðargrunninum.

– Skuldarbyrðan hjá festibóndum er at meta sum ein tann størsti trupulleikin hjá vinnuni, og samstundis ein verulig forðing fyri at náa setta endamálinum við landsjørðini, nevniliga, at tað fyrisitingarliga skulu skapast møguleikar fyri at menna framleiðsluna av landsjørðini.

– Tí metir Vinnumálastýrið tað vera av átrokandi týdningi at fáa greitt henda part, t.v.s. skuldina til Jarðargrunnin, skjótast til ber og samstundis fáa trygd fyri, at støðan ikki endurtekur seg. Vinnumálastýrið hevur tí í samráð við nýggja Jarðarráðið gjørt uppskot um reglur fyri, hvussu eftirgeving av skuld til Jarðargrunnin kann fara fram, sigur Finnbogi Arge.

**Saneringsavtala**

Og uppskotið er m.a., at gjaldsorkan verður ásett fyri hvønn garðin sær, og út frá mettu/ásettu gjaldsorkuni, verður skuldarbyrðan ásett, og skuldin til Jarðargrunnin, sum er omanfyri ásettu gjaldsorkuni, verður avskrivað. Festari, hvørs skuldarbyrða til Jarðargrunnin verður avskrivað, skal lata Jarðarráðnum allar upplýsingar, sum Jarðarráðið metir vera neyðugar fyri málsviðgerðina. Hann skal upplýsa, hvørt hann eigur fasta ogn og um henda ogn er veðsett, hvørt hann eigur innistandandi pening, virðisbrøv ella onnur virði, hvørt hann hevur leysaskuld, eisini um hon ikki hevur samband við garðsraksturin. Jarðarráðið kann treyta sær, at privata skuldin eisini verður umella niðurskrivað.

Verður talan um saneringsavtalu, sum festarin undirskrivar, eigur at verða ásett, at um hann ikki heldur saneringsavtaluna, missir hann festið, og hevur tá eingi endurgjaldskrøv mótvegis komandi festara ella Jarðarráðnum.


GSM frá Telebúðunum

...so ert tú altíð har, tú skalt vera!



**Ericsson T10s**
PRÍSUR VIÐ MVG 1990,-
Fartelefonin til tín, sum fegin vil hava ta nýggjastu tøknina, men sum eisini fegin vil hava eina snøgga bíliga telefon, mann leggur merki til.



**Ericsson T28s**
PRÍSUR VIÐ MVG 5295,-
Er ikki bert minsta fartelefonin, ið Ericsson hevur á marknaðinum. Hon er eisini nýskapandi við hópin av hentleikum m.a. vibrator, raddarstýring og profil-funktiónir.



**Nokia 3210**
PRÍSUR VIÐ MVG 2095,-
Hóast telefonin er lítil og snøgg, hevur hon ein stóran skíggja við stórari upploysn, sum gevur góðan mótlit og týðiligar bókstavar, ið eru lættir at lesa.



**Nokia 8210**
PRÍSUR VIÐ MVG 5390,-
Fartelefonin sum lurtar, tá tú tosar. Tú kanst goyma upp til 8 nøvn, sum tú kanst ringja til og sum verða styrd av røddini hjá tær. Er ein av lættastu telefonunum hjá Nokia.



**Nokia 8850**
PRÍSUR VIÐ MVG 6795,-
Uppkøllini kunnu stýrast av røddini hjá tær. Eisini er telefonin skjót at nýta, tá tú skalt skriva tekstboð, tí telefonin minnist, hvørji orð tú fyrr hevur skrivað. Hevur innbygda antennu og góða ljóðgóðsku.



**Siemens C25**
PRÍSUR VIÐ MVG 1695,-
Sera lítil, snøgg og bílig telefon, sum bert vigar 135 g. Er tilbúgvin í upp til 100 tímar og hevur upp til 5 tíma talutíð.



**Siemens S25**
PRÍSUR VIÐ MVG 2895,-
Hóast telefonin er lítil, hevur hon hópin av eyka hentleikum. Tær tørvar ikki eyka kaðal ella aðrar tvørligar innleggingar – við S25 kanst tú senda og fáa teldupost o.a. við einum infrareyðum interface.



**Motorola V3688**
PRÍSUR VIÐ MVG 5895,-
Telefonin hevur hópin av hentleikum, m.a. vibrator, sum ger, at tað ikki er neyðugt at órógva onnur, tá telefonin ringir.

*Fyrivarni verður tikið fyri prentvillum og útseldum vørum.*

TELEBÚÐIN

Tórshavn 31 70 10 • Tvøroyri 37 10 00 • Søldarfjørður 44 10 00
Norðurstreymoy 42 10 00 • Klaksvík 45 74 88 • Sandur 36 10 00 • Miðvágur 33 20 00

petur & petur • 320870